# Clickhaze fegnast um Roskilde-konsertina

**Fólkini í Clickhaze vóru sera væl nøgd við framførsluna á festivalinum í Roskilde, og í Nibe leitaðu fólk frá konsertini í fjør aftur til konsertina við føroyska bólkinum**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Seinastu dagararnar hevur føroyski rockbólkurin Clickhaze spælt á tveimum tónleikafestivalum í Danmark, og tað hevur gingið væl.

Festivalarnir eru nógvir í tali, men tað er eingin við síðuna ella yvir festivalinum í Roskilde, sum fyri kortum var kosin at vera heimsins besti festivalur, tá tað ræður um tónleik, trygd og umstøður annars.

Mikukvøldið spældi Clickhaze á campingpallinum í Roskilde. Tað er her nýggj nøvn fáa møguleikan at gera vart við seg. Sjálvur festivalurin byrjaði ikki fyrr enn hóskvøldið, men nógv fólk kom fyrr í vikuni til Roskilde.

Tað var nógv fólk til konsertina hjá Clickhaze mikukvøldið, og fólkini í bólkinum eru væl nøgd við framførsluna.

– Tað var gott lív í áhoyrarunum, og framførslan var væl eydnað. Tað var ikki minst lív í teimum hundraðtals føroyska áhoyrarunum, sum savnaðust framman fyri pallin og settu týðiliga dám á konsertina, sigur bólkurin á internetsíðu síni.

Tá Clickhaze hevði sett punktum fyri framførlsuni við sanginum Indigo Brow trivu føroysku áhoyrararnir í tjóðsanginum, og tað var ein øðrvísi endi á konsertini.

## Aftur í Nibe

Eftir konsertina í Roskilde legði Clickhaze leiðina til Nibe, har næsta uppgávan var á skránni hósdagin. Clickhaze spældi á festivalinum í Nibe í fjør, og tað gekk so væl, at leiðarin fyri festivalin beinan vegin bjóðaði Clickhaze at koma aftur í ár.

Clickhaze eru sera fegin um viðferðina, sum tey hava fingið frá festivalinum í Nibe, og tað er ikki minst leiðarin har, Peter Møller Madsen, sum eigur æruna av, at tað hevur gingið so væl hjá bólkinum í Danmark.

Clickhaze spældi á sama palli í ár, sum tey spældu í fjør, og aftur í ár gekk tað upp á stás. Ljóðið var gott, og bólkurin fegnast um, at fólk, sum vóru til konsertina í fjør, leitaðu sær aftur til Måneskinsteltet í ár. Fleiri teirra vildu vera við, at konsertin í ár var betri enn tann í fjør.

Í gjár fóru fólkini í Clickhaze til Keypmannahavnar, har tey skulu vera komandi dagarnar. Tey ætla at halda frí í nakrar dagar, og tey ætla sær at leita aftur til festivalin í Roskilde, har tað er møguleiki at hoyra nógvan góðan tónleik um vikuskiftið.

Næsta konsertin hjá bólkinum verður í Føroyingahúsinum í Keypmannahavn týskvøldið klokkan 20.00, og tá fer bólkurin 200 eisini at spæla. Hósdagin skal Clickhaze spæla á Midtfyns festivalinum, sum er næststørsti festivalurin í Danmark.



*Clickhaze hevur havt tvær góðar framførlsur á festivalum í Danmark seinastu dagarnar, og í næstu viku skal bólkurin spæla á enn einum stórum festivali*

# FSF gongur undir í útlendskum brøvum

**– Vit hava fingið óvanliga nógv brøv sendandi úr útlondum, síðani vit drógu Týskland í okkara bólk. Tað er vónleyst at svara øllum brøvunum, sigur Dánjal Andreasen, formaður í FSF, sum er sannførdur um útseldan dyst næsta summar**

FSF
*Eyðun Klakstein*

Fótbóltssamband Føroya hevur merkt øktan áhuga fyri føroyskum fótbólti, síðani vit komu í EM-bólk saman við Týsklandi.

– Vit fáa eina ørgrynnu av brøvum sendandi úr útlondum. Fólk vilja hava upplýsingar um føroyskan fótbólt og landsliðið, og tey biða um nálir og vimplar, sigur Dánjal Andreasen.

– Vit royna at svara so nógvum brøvum, sum vit klára, men tað er vónleyst at svara øllum brøvunum, sigur hann.

Tað er vanligt, at FSF fær nógv brøv úr útlondum, men áhugin fyri føroyskum fótbolti hevur verið størri enn vanligt, síðani Týskland kom í okkara bólk.

## Heldur við Brasil

Bossurin í føroyskum fótbólti fer sunnudagin at halda við Brasil, hóast dysturin kann geva føroyingum fyrsta møguleikan at møta heimsmeistarunum.

– Eg má bara siga sum er, at eg haldi við Brasil, tí mær dámar betur teirra fótbóltsspæl. Tað er stuttligt at hyggja eftir dystum, tá Brasil spælir væl, meðan Týskland ikki rættiliga kann undirhalda á sama hátt, sigur Dánjal Andreasen.

Fyri Fótbóltssamband Føroya hevur tað ikki so nógv at siga, hvørt Týskland verður heimsmeistari ella ikki sunnudagin. Allar avtalur, sum FSF byggir sítt virksemi á, eru gjørdar fyri fleiri árum síðani, og tí kastar tað einki eyka av sær, at Týskland vinnur HM.

Tá Føroyar komu í bólk saman við Týskland, hevði táverandi formaðurin í FSF, Torleif Sigurðsson, ilt við at fjala stóru gleðini um, at tað gevur milliónir í FSF-kassan umvegis sjónvarpsrættindini, sum UFA hevur keypt frá FSF. Hendan avtala verður ikki ávirkað av úrslitinum í finaluni sunnudagin, men Dánjal Andreasen heldur, at um Týskland vinnur, so kann tað kanska fáa positiva ávirkan á samráðingar í framtíðini.

## Væntar útselt

Landsdysturin millum Føroyar og Týskland næsta summar skal spælast á Tórsvølli í Havn, og formaðurin í FSF gleðir seg til tann stórdystin.

– Eg dugi ikki at hugsa mær til annað, enn at øll áskoðaraplássini verða seld, og at vit fáa ein góðan dyst, sigur hann.

FSF-bossurin viðgongur, at áhugin fyri týska landsliðnum ivaleyst verður størri, um teir koma til Føroya sum heimsmeistarar, men tað fær hann ikki at broyta støðu til, hvønn hann heldur við í HM-finaluni sunnudagin.

Hann vil hava Ronaldo og teir at vinna á Kahn og teimum.



*– Eg dugi ikki at hugsa mær til annað, enn at øll áskoðaraplássini verða seld, tá Týskland kemur til Føroya at spæla næsta ár, sigur Dánjal Andreasen*

Magni Arge:

# Best um Týskland vinnur

**– Fyri fótbóltin ynski eg, at Brasil stendur seg væl í finaluni, men fyri Føroyar og føroyskan fótbólt er einki at ivast í, at Týskland er rætti vinnarin. Tí haldi eg við Týsklandi sunnudagin, sigur stjórin á Atlantsflog**

FERÐING OG FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Tað vóru nógv fólk, sum høvdu trupult við at fáa armarnar niður, eftir at Føroyar varð drigið í sama bólk sum Týskland til EM-undankappingina næstu tvey árini.

Hesi fólk hava fingið enn meira at fegnast um, síðani Týskland spældi seg í finaluna í heimsmeistarakappingini í fótbólti, sum verður hildin í Japan og Suðurkorea í hesum døgum.

Ein av teimum, sum er fegin um týsku mótstøðuna, er Magni Arge, sum er stjóri fyri føroyska flogfelagnum, Atlantsflog.

– Tað er ógjørligt at siga, hvussu nógv virði er í umtaluni, sum Føroyar fara at fáa í sambandi við dystirnar ímóti Týskland. Hendan umtala kann næstan ikki metast ov høgt, og í krónum og oyrum er talan eina risastóra milliónaupphædd, sigur Magni Arge.

– Atlantsflog – og føroysk ferðavinna annars – hevur lítlar møguleikar at keypa sær lýsingar í útlendskum fjølmiðlum, tí tað kostar so nógv, men tveir fótbóltsdystir ímóti Týsklandi geva eina rúgvu av ókeypis umtalu, sum vit kunnu njóta gott av.



*– Tað er umráðandi, at Føroyar eru við í altjóða fótbóltskappingum. Tað er gott fyri føroyskan fótbólt, men sanniliga eisini fyri føroyska samfelagið annars, heldur Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi*

## Heldur við Týsklandi

Atlantsflog hevur ikki merkt øktan áhuga fyri EM-dystinum millum Føroyar og Týskland næsta summar, síðani týskarnir spældu seg í HM-finaluni, men áhugin hevur verið stórur, síðani lutakastið var.

– Tað var ómetaliga gott fyri Føroyar og føroyskan fótbólt, at vit fingu Týskland í okkara bólk, og at teir nú eru komnir í HM-finaluna og hava møguleika at gerast heimsmeistarar, ger bara støðuna betur, sigur Magni Arge.

Sunnudagin skal tað gerast av, hvør kann kalla seg heimsmeistara næstu fýra árini. Dysturin stendur millum Týskland og Brasil, og tað kann fáa ein fótbóltsáhugaðan stjóra at ivast eitt sindur.

– Fyri fótbóltin ynski eg, at Brasil stendur seg væl í finaluni, men fyri Føroyar og føroyskan fótbólt er einki at ivast í, at Týskland er rætti vinnarin. Tí haldi eg við Týsklandi sunnudagin, sigur Magni Arge.

## Gera nógv við Týskland

Atlantsflog gjørdi eftir EM-lutakastið av, at næstu tvey árini skal felagið gera meira við at fáa viðskiftafólk í Týsklandi. Umrøðan frá fótbóltsdystunum skuldi brúkast sum frægast, og longu tíðliga í ár, var føroyska flogfelagið umboðað á eini ferðavinnustevnu í Berlin.

Tá høvdu teir Allan Simonsen við sær á stevnuni, og tað var nevniliga við fótbóltinum í huga, at fyrrverandi landsliðsvenjarin var við.

– Vit hava lagt eina ætlan um at gera vart við okkum í Týsklandi, og nú týskarar møguliga gerast heimsmeistarar, styrkir tað bara okkara ætlan um at gera serliga nógv við Týskland næstu tvey árini, sigur Magni Arge.

Atlantsflog hevur síðani 1995 verið ein av bestu stuðlunum hjá føroyska landsliðsfótbóltinum, og stjórin í felagnum heldur, at tað ferð eftir ferð vísir seg, at fótbóltslandsliðið er besta umboðið fyri Føroyar og føroyska ferðavinnu.

– Vit hava havt víst góðan vilja mótvegis fótbóltslandsliðnum í nógv ár, og tað hava vit gjørt, tí vit halda, at tað er umráðandi, at Føroyar eru við í altjóða fótbóltskappingum. Tað er gott fyri føroyskan fótbólt, men sanniliga eisini fyri føroyska samfelagið annars, heldur Magni Arge.

– Umframt at fótbólturin skapar størri áhuga fyri Føroyum, økir tað eisini um ferðsluna til og úr Føroyum, tá dystir eru, sigur Magni Arge.

Og tá Týskland og Føroyar hittast í Havn næsta summar, kann Atlantsflog eisini roknað við at fáa lut í nógvu ferðingini, sum verður til og úr Føroyum í sambandi við dystin.



# Fuglfirðingar fáa nýggja mentanarborg

**Leygardagin verður nýggja Mentanarhúsið í Fuglafirði alment tikið í nýtslu. Í august mánaði verður rættilig ferð sett á virksemið í húsinum**

MENTAN
*Eyðun Klakstein*

Fuglafjørður: Leygardagin verða dyrnar latnar upp á víðan vegg í nýggja Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og tað er ikki sørt, at fuglfirðingar gleða seg til, at húsið rættiliga fer at virka.

Mentanarhúsið er klárt at taka í nýtslu, og leygardagin verður hetta staðfest við einum hátíðarhaldi. Hetta hald skal gera greitt, at húsið nú er tikið alment í nýtslu.

Mentanarhúsið í Fuglafirði hevur kostað stívliga 12 milliónir at byggja, og tað hevur verið leingi ávegis. Nú eru ídnu fólkini aftan fyri húsið umsíðir komin á mál, og í august mánaði verður rættilig ferð setta á virksemið í húsinum.

## Røður og frágreiðingar

Men fyrst er almenna hátíðarhaldið leygardagin á skránni. Dyrnar lata upp klokkan 16.00, og sjálvt tiltakið byrjar ein tíma seinna.

Fyrst fer Eyðun Hansen at siga frá um Fuglafjarðar Sjónleikarfelag, sum eigur húsið, og hann fer eisini at greiða frá gongdina við at byggja húsið, og hvussu tað hevur latið seg gjørt.

Arnold Abrahamsen fer at siga frá, og eldri sjónleikarar fara at spæla brot út fyrsta leikinum hjá Fuglafjarðar Sjónleikarfelag. Leikurin kallaðist »Hjá Dalabóndum« og varð spældur í 1955. Pallsetingin frá hesum leiki verður eisini brúkt á eini plakat, sum verður gjørd í avmarkaðum upplagi í sambandi við hátíðardagin. Hesa plakat hevur Vígdis Petersen lagt til rættis.

Jóhan Heri Joensen, sum formaður í mentamálanevndini hjá Fuglafjarðar býráð fer at halda røðu, og ætlanin er, at landsstýrismaðurin við mentamálum, Annlis Bjarkhamar, eisini skal leggja leiðina fram fyri at siga nøkur orð.

## Kapping um búmerki

Fuglafjarðar Sjónleikarfelag hevur skipað fyri kapping um nýtt búmerki til Mentanarhúsið, og vinnarin av hesi kapping verður funnin undir tiltakinum leygardagin. Vinnandi búmerkið verður sjálvandi eisini víst fram.

Harafturat verður eisini ein uppboðssøla við málningum, sum ymsir listarmenn hava latið til tiltakið. Hesari uppboðssølu fara Ditleif Eldevig og Terji á Lakjuni at standa fyri.

Aftaná verður møguligt hjá fólki at fáa orðið, um tey hava onkra heilsu at bera ella onkra viðmerking at koma við.

## Byrjar í august

Tiltakið leygardagin markerar, at nú er Mentanarhúsið í Fuglafirði opið. Næstu tíðina verða ivaleyst onkur tiltøk, millum annað í sambandi við varmakeldustevnuna, men frá 1. august verður rættilig ferð sett á virksemið.

Mentanarhúsið ætlar sær at bjóða tiltøk mest sum hvørt vikuskiftið, og talan verður bæði um framførslur av ymsum slag, dansitiltøk, konsertir, framsýningar og annað.

Størsta tiltakið í august mánaði verður helst, tá norski dansibólkurin Gluntan fer at spæla har. Hetta tiltak verður 30. august. Listarstevnan verður hildin kring landið í august mánaði, og eini fimm tiltøk verða í hesum sambandi í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Onnur forvitnislig tiltøk verða eisini á skránni fyrstu tíðina.

## Væl útgjørt

Mentanarhúsið í Fuglafirði er væl útgjørt við ljóðanleggi og ljósi. Nógv er gjørt burtur úr ljóðviðurskiftunum í húsinum, og her hevur Jóannes Steingrund verið íðin at skipa fyri. Sagt verður um húsið, at tað valla eigur sín líka í Føroyum, tá tað ræður um ljóðviðurskifti.

Mentanarhúsið hevur eisini sína egnu matstovu, og skeinkiloyvi er til húsið. Ætlanin er, at matstovan skal lata upp fyrst í august mánaði.

350 fólk kunnu sessast í húsinum, men verða stólar ikki settir upp í stóra salinum, kunnu sløk 800 fólk verða inni í senn.

Edward Fuglø hevur eisini havt ein fingur við í spælinum. Hann hevur valt litirnar, sum húsið er prýtt við innan.

Jonhard Hammer úr Gøtu er settur sum dagligur leiðari í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

# Ferðráðið roynir at lokka týskarar





*– Fótbóltur hevur so ómetaliga nógv at siga fyri Føroyar, og tí taki eg undir við teimum, sum halda, at landsliðið skal hava enn betri møguleikar til at venja undir, sigur Heri Niclasen*

**Hera Niclasen dámar væl brasilskan fótbólt, men fyri hansara starvsøkið og føroyska samfelagið er tað betur, um Týskland vinnur HM-finaluna sunnudagin**

FERÐING OG FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Stjórin á Ferðaráðnum ætlar sær at rópa á Týskland sunnudagin, hóast tað gongur út yvir fótbóltssnillingarnar úr Brasil.

– Brasil hevur nakrar frálíkar fótbóltsspælarar, og teir spæla góðan fótbólt, men tað er gott fyri Føroyar, um tað verða týskararnir, sum vinna finaluna sunnudagin. Tað er kanska eitt sindur av handilsligum orsøkum, men eg fari at halda við Týsklandi, sigur Heri Niclasen.

– Tað er munur á at spæla ímóti einum týskum landsliði og heimsmeistarunum. Um nú Týskland vinnur HM, so fáa vit ein gyltan møguleika at spæla ímóti heimsins besta landsliðið, og áhugin fyri einum slíkum dysti verður uppaftur størri, enn hann var frammanundan, heldur hann.

## Týskarar skulu steðga longri

Síðani tað gjørdist greitt, at Føroyar skulu spæla tveir EM-dystir ímóti Týsklandi, hevur Ferðaráðið arbeitt miðvíst við at nýta hendan møguleika til fulnar á týska marknaðinum.

– Nógvir týskarar vitja sum í Føroyum, men ein stórur partur av teimum steðgar bara her á veg til Íslands. Vit vilja fegin hava teir at steðga longri í Føroyum, og at hava Føroyar sum veruliga ferðamálið hjá sær, sigur Heri Niclasen.

Tí hevur Ferðaráðið sett fólk burtur av at arbeiða við EM-londunum. Áhugin fyri fótbólti er ovurhonds stórur í flestu londunum, og tí er tað ein framúr møguleiki hjá føroyskari ferðavinnu og øðrum at gera vart við seg í hesum sambandi.

– Vit royna við okkara orku at føra Føroyar fram á ymsan hátt. Vit hugsa ikki bara um ferðavinnuna, men eisini um ítrótt, mentan og vinnulív. Vit hava ført okkum fram í Týsklandi í eina tíð, og hóast úrslitið ikki er so gott, sum vit høvdu vónað, so gongur tað væl við hesum arbeiði, sigur Heri Niclasen.

## Vónar gott úrslit

Eitt er, at føroyska landsliðið sleppur at royna seg ímóti Týsklandi. Tað er í sær sjálvum spennandi og gott fyri føroyskan fótbolt og samfelagið annars. Men stjórin á Ferðaráðnum sær fyri sær, at um føroyingar avrikað eina sensatión, so kann tað geva Føroyum enn meira burturúr.

– Fótbóltur hevur so ómetaliga nógv at siga fyri Føroyar, og tí taki eg undir við teimum, sum halda, at landsliðið skal hava enn betri møguleikar til at venja undir. Tað ræður um at vera við, men tað ræður eisini um at fáa góð úrslit og at gera vart við seg á tann hátt, heldur Heri Niclasen.

– Í løtuni er eitt sindur ørkymlaður um føroyska fótbóltslandsliðið, tí eg veit ikki, hvussu tað stendur til. Venjari hevur ikki enn verið í Føroyum, og tá er liðugur við sínar feriu, eru bara fáar vikur at arbeiða í, áðrenn vit skulu møta Týsklandi fyrru ferð. Tí ivist eg eitt sindur í ítróttarliga møguleikanum at gera vart við okkum, sigur stjórin á Ferðaráðnum.